# Sermerktir galla og brúðarkjólar

**Fríggjakvøldið var mótashow á Hotel Føroyum við gallakjólum og brúðarkjólum**

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tað var danski sniðgevin Helene Stjernholm, ið sýndi fram nøkum av pløggunum hon hevur sniðgivið og seymað.

Framsýningin byrjaði við undirhaldi frá fýra dansigentum. Síðani var showið býtt í tvey, har fyrri partur var við gallakjólum, sum vóru rættiliga ymiskir, bæði í liti, mynstri og sniði. Í seinna parti vóru brúðarkjólarnir sýndir fram, teir vóru eisini sera ymiskir, summir vóru einfaldir og siðabundnir og aðrir vóru heldur óvanligir.

Eini 250 áskoðarar vóru til mótashowið, tey flestu vóru konufólk, men eisini heilt fitt av mannfólki var til staðar.

**- ella**











*Modellin á motorsúkkluni tók ímóti gestunum*



*Dansararnir ið undirhildu vóru: Gunn R. Joensen, Jóna Johannesen, Súsanna J. Christiansen, Ásla Dam og Gyða B. Jacobæus*

ÚTBJÓÐING

## Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið viðvíkjandi Tekniska Skúla í Klaksvík, "Útbygging av HT Deild", boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið verður boðið út í hesum arbeiðstøkum
A. Stórarbeiðstøka (jørð- og kloakk-, betong-, stál-, timbur- og snikkaraarbeiði v.m.)
B. Múraraarbeiði
C. Málaraarbeiði
D. Gólvarbeiði
E. HVS- og Ventilatiónsarbeiði
F. El-arbeiði

Útbjóðingartilfarið skal bíleggjast í seinasta lagi 20. september 2006 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr. fyri hvørja arbeiðstøku, ið verður at flyta á konto nr. 9181 – 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er sent aftur óskalað í seinasta lagi eina viku aftaná lisitatiónina, tað er 31. oktober 2006.

Lisitatiónin verður á Tekniska Skúla, Nýggivegur, Klaksvík, týsdagin 24. oktober 2006 kl. 14.00.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5 Postsmoga 78, Tórshavn | Tel 340 800, Faks 340 801 lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land